# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Skúlaveitsla í 1964



Mynd frá "Realskúla-framsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunu-skúlanum í Havn í 2007. Myndin er tikin fyri 45 árum síðan í sambandi við eina skúlaveitslu í Losjuni í 1964.

Á myndini eru f.v.: Sanna Waagstein Johansen, Sunneva Dalsgaard, Símun W. Arge og Haraldur Eirikstoft.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon 226024 (mynd nr. 105)

*Myndaeigari: Anna Sofía í Brekkunum*

## Country á Ellisheiminum



Mentanartiltøkini á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi halda fram. Í samband við at 25 ár eru liðin, síðan heimið varð tikið í nýtslu, verður skipað fyri fleiri ymiskum almennum mentanar-tiltøkum á heiminum.

Mikukvøldið 4. november verður skipað fyri einum coutrykvøldi á heiminum. Tað eru tey trý: Hallur Joensen, Kristina Bærendsen og Beddi Hansen, sum fara at syngja og spæla góðan country tónleik í kantin-uni.

Aftaná mentanartiltakið mikukvøldið verður møguleiki at keypa sær ein kaffimunn. Tiltakið er alment, og øll eru væl-komin.

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 7. nov. fyllur Óli Johansen, vanliga nevndur Suðringurin. Føðingardagurin verður hildin í heiminum Sjógøta 135, Tvøroyri. Opið hús frá kl. 13-20.

**60 ára føðingardagur**
23. okt. fylti Solmaj í Lágabø, 60 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 7. nov. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Mikudagin 4. nov. verður Arna Dalbø Hansen, Svínáir, 80 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 7. nov. frá kl. 12 til kl. 15.

**90 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 6. nov. verður Hildigarð Hansen, Syðrugøtu, 90 ár. Dagurin verður hildin í Gøtubrá frá kl. 19. Øll eru vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
30. nov. hava hjúnini Alberta og Eirikur Magnussen, Tórshavn, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 28. nov. í HB-Húsinum kl. 19. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga fra á tlf. 216324 (Alberta) ella 214456 (Eirikur) innan 14. nov.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 1. nov. hava Kristina og Hans Andrias Jacobsen (Stina og Dia av Syðradali), gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin 7. nov. í Bøgøtu 3, Klaksvík. Vælkomst verður frá kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Kristinu og Hans Andrias, kunnu siga frá á tel. 456737 ella 458625.

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 6. nov. kunnu hjúnini Maria og Hans David P. Johansen, Strendur, halda gullbrúðleyp. Dagurin verður hildin í Sjókaféini í Runavík saman við familjuni.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 7. nov. hava Jonny og Thomas Jacobsen, Søldarfjørður, gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 8. nov. kunnu hjúnini Herborg og Hildibjart Johansen, Tórshavn, halda gullbrúdleyp. Tey ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið, eru vælkomin til eina hugnaliga løtu í Starvsmannafelagshúsinum J.H. Schrøtersgøta 9 frá kl. 12 til 17.

**Gullbrúdleyp**
28. nov. hava hjúnini Tóra og Ólavur Nolsøe Olsen, Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík leygardagin 5. des. kl. 18. Tey ið vilja halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 444159 - 737751 ella toraolavur@gmail.com áðrenn 20. nov.

**Diamantbrúdleyp**
Mánadagin 9. nov. hava Amalie og Jens Mouritsen, Sørvágur, verið gift í 60 ár. Dagurin verður hildin 14. nov. frá kl. 18 hjá soninum, á Magnusarbø 6, Sørvágur.




## Dagurin

**3. november. Hubertus,** deyður ár 727. Var biskupur í Maastricht eftir Lambertus, sum doyði umleið ár 705. Var tiltikin veiðimaður og gjørdist verndarhalgi-menni hjá øllum veiðimonnum. Halgisøgan sigur, at hann legði veiðiferðirnar av, tá ið hann ein dagin sá ein hjørt við einum lýsandi krossi millum hornini. Í mongum londum verða havdar sonevndar hubertus-veiðiferðir. Haruskjótingin í Føroyum, sum er um hetta mundið, kann sigast at vera ein leivdin av hes-um siði. Týskt navn, samansett av orðum, ið merkja hugur og bjartur.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Tøkk

Takk fyri sýnda samkenslu,
tá lítli sonur og beiggi okkara

**Jákup Tausen**
føddur tann 29.10.08 og andaðist tann 16.11.08

andaðist og varð jarðaður

*Familjunnar vegna*
**Joan, Jaspur, Lovisa, Kristina og Maria**

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu,
tá kæra systir okkara

**Malan Djurhuus**

brádliga doyði og varð jarðað.

Tøkk til Bjarna Bæk, dómpróvst.
Tøkk fyri blómur og kransar og til tykkum, sum fylgdu henni til tyrluna í Skúvoy og til hennara seinasta hvíldarstað í Havn.

*Familjunnar vegna*
**Systkini**